# Jóhan fer av landinum

Dysturin á Svangaskarði millum B68 og B36 var tann seinasti í hesum umfarinum hjá Jóhan V. Gunnarsson. Í fjør fekk spælarin sítt veruliga gjøgnumbrot á Formula-liðnum hjá B36, og tó at hann var í Danmark part av árinum í ár, so kom hann beint inn á liðið, tá flytingarvindeygað aftur lat upp. Nú gongur leiðin tó aftur til Danmarkar og universitetslesna, og tá ber illa til at røkja Formula-skyldur fyri føroyskt felag.



# OL-gull til Nadal

Tað var eingin ivi, tá spanski Rafael Nadal sunnudagin spældi OL-finalu móti chilenska Fernando Gonzalez. Gonzalez royndi at stríðast móti yvirvaldinum, men hann í botn og grund ongan møguleika móti hartsláandi spaniólanum. Settúrslitini gjørdust 6-3, 7-6, 6-3, og við sigrinum vann Nadal seg eisini upp á ovastu rók á heimsstyrkislistanum. Her hevur Roger Federer annars verið ovastur størsta partin av árinum, men hann kiksaði tíðliga í OL-kappingini.



*David Jones var í ár einasti útlendski venjarin í Formula-deildini. Hann er nú uppsagdur, og tí er talan um óvanliga støðu, har allir venjarar í fremstu føroysku røðini hava føroyskt pass*

# Nú eru allir føroyingar

**David Jones var í ár einasta útlendska ískoytið á venjarabeinkinum. Nú Albert Ellefsen hevur sett seg í sessin, er talan bert um føroyskar venjarar í Formula-deildini**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað hevur verið púrasta vanligt hjá føroysku feløgunum tey nógvu seinastu árini, at tey av og á hava havt útlendskar venjarar. Men soleiðis hevur ikki verið í ár. Tá farið varð undir fyrireikingarnar til ársins útgávu av Formula-deildini, var brasilski Dida einasti útlendingurin. Papp-írini hjá honum vóru tó ikki heilt í lagi, og tí varð Anton Skoradal førkaður fram til høvuðsvenjarasessin.

Í Fuglafirði gekk karusellin hinvegin. Jón Simonsen skuldi upprunaliga røkja tann sessin, men av privatum orsøkum mátti hann melda pass, longu áðrenn kappingin byrjaði. Abraham Løkin tók um endan í fyrireikingunum til kappingina, og tá David Jones so loksins vendi aftur til Fuglafjarðar, var fagnaðurin stórur.

Tað var hann eisini fyrstu umførini, har ÍF tók øll á bóli, men síðani hevur gingið meira striltið. Tað hevur ljóðað, at ein ávís ónøgd hevur verið við venjaran, og í farnu viku bórust so boðini um, at venjarin var sendir til hús.

Aðrar viðmerkingar enn tað sama hevur leiðslan í ÍF ikki viljað gjørt til málið. Okkum hevur heldur ikki eydnast at fáa orð á David Jones, men við Vikublaðið sigur bretin, at hann heldur talan vera um løgna avgerð. Og hann sigur, at talan ikki er um, at partarnir samdust um at slíta samstarvið, soleiðis sum leiðslan í ÍF annars hevur sagt.



*Sandoyingarnir vóru leingi sera hart kroystir, men við tveimum málum seinasta korterið syrgdi Clayton Soares fyri, at trý serstakliga týðandi stig kundu setast á kontina*
*savnsmynd*

B71-ÍF 2-1 (0-0):

# Stinnir sandoyingar

**Enn einaferð nærkaðist B71 bjargingini. Hesa ferð vendu teir hóttandi tapi til sigur, og nú eru KÍ og ÍF bert tvey stig frá hálvgum flúgvandi sandoyingunum**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*B71*



*ÍF*

Clayton Soares hevur kanska ikki verið eins vandamikil fyri mótstøðuliðini hjá B71 í ár, sum hann annars hevur verið.

Langlimaði brasiliumaðurin er framvegis ein tann mest týðandi spælarin á liðnum hjá B71, men undan sunnudegnum hevði hann altso bert skotið tvey mál í ársins útgávu av Formula-deildini.

Seinasta korterið av dystin móti ÍF sunnudagin sendi Clayton tó tvær ferðir bóltin í meskarnar, og so var lagið gott á Sandi, har B71 nú bert hevur tvey stig upp til bjarging.

## Dýrt reytt kort

Leingi var annars líkt til, at ÍF hevði gjørt nóg mikið til at fáa í øllum førum eitt – og kanska eisini trý – stig við sær til hús.

Talan var fyri tað nógva um ein sera tættan dyst, men fyrstu trý korterini vóru gestirnir oman á leikliga. Og teir áttu eisini onkran stóran møguleika, sum væl kundi kastað mál av sær.

Mál fingu teir tó eftir steðgin, tá Andy Olsen kundi gera sær dælt av, at B71 nú royndi at ota seg longur fram eftir vøllinum, og so stóð heilt nógv á hjá B71.

Tað eydnaðist tó vertunum at koma aftur í dystin, tá Gudmund S. Nielsen varð feldur. Sandoyingar var púrasta leysur, og tí gjørdist talan um reytt kort, tá Andras Gango tók beinini undan manninum.

Brotssparkið setti Clayton Soares í netið, og tað var so eisini hann, ið setti sigursmálið inn. Hesa ferð var tó talan um stórt mistak frá Eyðuni Ryggshamar, sum varð settur at verja ÍF-málið seinastu løtuna. Frísparksinnlegg varð skotið innfyri, og onkursvegna fekk bólturin loyvi at ferðast allan vegin í netið.

## Øktur spenningur

Og so er annars lagt upp til øktan spenning í botninum av Formula-deildini. Fleiri ferðir hava sandoyingarnir havt knívin á barkanum seinastu mánaðirnar, men aftur hesa ferð prógvaði liðið, at teir vilja ikki sleppa takinum í liðunum, sum eru at finna beint oman fyri strikuna.

Eitt av hesum liðum er ÍF, sum hinvegin tykist kiksa, hvørja ferð teir hava møguleikan til veruliga at skræða seg leysar av botninum. Tað var søgan, tá teir taptu móti B68 seinast, og tað var so aftur søgan hesaferð.

Og hóast 20 stig vanliga eru nóg mikið at bjarga sær tilveruna í deildini, so munnu fuglfirðingar als ikki kenna seg tryggar við hesum. B71 hevur nevnliga 18, og av teimum eru tey 13 vunnin í seinastu seks dystunum, og tí er væl ikki annað enn væntandi, at meira enn tvey av slagnum koma til høldar næstu níggju dystirnar.